# og jólakonsert

Ein fullsett ítróttarhøll; ikki minst av barnafamiljum



Ein av sera dugnaligur, ungur, klassiskur gittarleikari, Alvi Joensen

ga skapandi hevur hon gjørt vart við seg, m.a. tá hon vann singer-song-writer kappingina, sum Hafnia Lounge skipaði fyri í ... Frá skeiðum uttanlands hevur hon eisini vunnið sær leiklistarligar fortreytir; men fyrst og fremst hevur hon ta persónsmensku og tann humoristiska sans, ið ber uppi í leikluti sum hesum.

Forkunnug og góð uppliving var tað at hoyra klassiska guittarsolo við symfoniskum fylgispæli, tá tann dugnaligi Alvi Joensen saman við symfoniorkestrinum spældi part úr "Fantasia" eftir Joaquin Rodrigo.

Tá nú Berharður Wilkinson við sínari tónleikaramanning orkestralt tók samanum við tí spræknа "Pirates of Carribean" eftir Klaus Badelt kundu vit enn einaferð frøast um okkara frálíka symfoniorkestur í hondunum á hesum úrmælingi. Men samtundis er tað harmast um, at hetta fremsta liðið í okkara tónlistarheimi ikki fær sømdir til eitt meira virksemi. Seinasta nosið var messan eftir Haydn í september, og eftir tað mátti symfoniska heystkonsertin uppgevast av fíggjarligum orsøkum. Professionel orkestur av slíkum slag uttanlands, eitt nú íslendska symfoniorkestrið, hava vanliga ei-na framførslu um vikuna. At okkara orkestur skuldi kunnað trinið fram eina ferð um mánaðin kann ikki vera ov mikið at ynskja eftir. Slíkt virksemi kostar meira, enn einans kann setast av á fíggjarlóg landsins til einstakt ljómlið; men Føroya Symfoniorkestur er alvi musikkskúlans og eitt kærkomið høvi til trivnað hjá okkara professionellu musikklærarum. Tí kann tann áheitan á okkara politiska myndugleika ikki ov mikið endurtakast um at gera útinnandi virksemi til part av starvsssetninginum hjá teimum musikklærarum, sum ynskja tað. At reglugerð tá má setast upp í samstarvi millum musikkskúlaleiðslu, Musikklærarafelagið og eitt nú Føroya Symfoniorkestur er sjálvsagt.

Men inni í Runavík var løtan ikki minst hugtakandi, tá nú 200 børn úr Tórshavnar Musikkskúla og úr Sankta Frans, Leirvíkar, Glyvra og Runavíkar nissuklødd komu sníkjandi í hálvmyrkrinum og upp á pall at framføra 4 sangir saman við symfoniorkestrinum. Væl var fyrireikað, væl var skipað fyri, og fløvandi var tað fyri foreldur og onnur áhoyrandi – teirra millum eitt gamalt lærarahjarta – at uppliva henda stóra barnaskara uttan himpr uttanat av fullum huga syngja "Nú liggur ein kavafonn tindi á" (vísulag við teksti eftir Símun av Skarði), "Um tú hittir jólamannin" (lag: Ingi Isaksen, tekstur: Steintór Rasmussen), "Úti í tí myrku nátt" (lag og tekstur: Pauli í Sandagerði) og "Rottujól" (lag: Pauli Hansen, tekstur: Sverri Egholm). Fylgispælið til tríggjar teir fyrstu gjørdi Atli K. Petersen, og tað seinasta legði Pauli sjálvur til rættis.

Eftir áhaldandi lógvabrestir endaði hendan jólafagnarløtan í Runavíkar Íróttarhøll við jólaslagaran um "Nissumamma og nissupápi" (arr. Atli K. Petersen) sum rungandi eykanummari.

Tey smærri børnini hugnaðu sær eisini



Bára Berghamar Danielsen við síni klokkukláru rødd